## Formuladeildin

| | | |
|---|---|---|
| 15/10 | ÍF-EB/Streymur | Eiler Rasmussen |
| 15/10 | VB/S-NSÍ | Petur Reinert |
| 15/10 | B68-HB | Lassin Isaksen |

## Finalan um Løgmanssteypið

| | | |
|---|---|---|
| 14/10 | B36-KÍ | Dagfinn Olsen |

## 1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 14/10 | SÍ-AB | Ransin N. Djurhuus |
| 14/10 | LÍF-B71 | Lars Múller |

## U19 tapti ímóti Íslandi

Føroyska U19 landsliðið í fótbólti spældi mikudagin seinasta dystin í EM-undankappingini í Svøríki. Dysturin var ímóti Íslandi.

Ísland vann dystin 3-1, eftir at støðan hevði verið 0-0 í hálvleikinum. Beint eftir steðgin skoraði Skúli Jónasson til 1-0, og eftir ein tíma øki Arnor Smárason úr Heerenveen til 2-0. Tveir minuttir seinni skoraði Rurik Gislason úr Charlton til 3-0.

Føroyar minkaðu um munin 10 minuttir fyri tíð, og tað var Sam Jacobsen úr GÍ, sum skoraði málið.



# Viljin hjá venjaranum hevur ført liðið í finaluna

**- Venjarin hevur trúð upp á okkum, og tað haldi eg vera eina av týdningarmestu orsøkunum til, at vit skulu leika steypafinalu leygadagin, sigur Atli Danielsen, verjuspælari hjá KÍ**

STEYPAFINALAN

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Vit skulu fimm ár aftur í tíðina fyri at finna síðsta finaluplássið hjá KÍ. Tá taptu teir í steypafinaluni. Seinast KÍ hevur vunnið nakað var í 1999, tá teir vunnu bæði landskapping og steypakapping. Felags fyri KÍ-liðið í 1999 og KÍ liðið í dag er, at sami venjari stendur við stýrisvølin.

Atli Danielsen metir, at viljin hjá venjaranum, Tony Paris, at vinna, hevur havt ótrúliga stóra ávirkan á leikararnar.

- Vit vóru ikki meir enn komnir í gongd við kappingarárið, tá Tony Paris fór út í bløðini og segði, at vit skuldu vinna antin landskappingina ella steypakappingina. Hetta setti krøv til okkum spælarar, men venjarin trúði upp á okkum, og tað haldi eg vera eina av týdningarmestu orsøkunum til, at vit skulu leika steypafinalu í morgin.

### Mangla týðandi leikarar

KÍ manglar tó týðandi leikarar til dystin sunnudagin, og Atli Danielsen sigur, at hetta er stórur missur fyri KÍ.

- Harley Bertholdsen hevur brotið eina tá, og tí verður hann ikki við í finaluni. Paul Clapson hevur eisini drigist við ein knæskaða í eina tíð, men í vikuni byrjaði hann at venja aftur. Í hósdagsvenjingini endaði tó aftur galið. Paul Clapson mátti á sjúkrahúsið við pínu í knænum, og tíverri kom hann út aftur á høkjum. Vit vita ikki við vissu, um Paul Clapson verður klárur til dystin í morgin, men tað sær svart út.

Hetta er dyggur smeitur fyri klaksvíkingar. Harley er ein av mest royndu leikarunum á liðnum, og tí er keðiligt at missa hann til ein so týðandi dyst, sigur Atli. Hann leggur afturat, at stórur saknur eisini verður í Paul Clapson, um hann ikki gerst klárur.

- Paul Clapson er toppskjútti hjá okkum í ár. Hann hevur dugað væl at hildið uppá bóltin frammi í álopinum, og júst hesum hava vit brúk fyri á Tórsvølli. Vit fara neyvan at síggja nakað polerað fótbóltsspæl, so tí hevði verið gott at havt ein sum Clapson við, tí hann stríðist fyri hvørjum bólti.

### Ætla at vinna restina av dystunum

At enda spurdu vit Atla, um teir nú bert ætlaðu at vinna steypakappingina og samstundis ikki satsa so nógv í landskappingini.

- Júst nú hugsa vit bert um steypakappingina. Hana vilja vit heilt sikkurt vinna. Tveir dystir eru tó eftir í landskappingini, og vit hava enn ein møguleika at røkka triðja plássinum. Í dag og í morgin hugsa vit bert um steypakappingina, men vit hava eisini ætlanir um at vinna báðar dystirnar, sum eru eftir í landskappingini, sigur Atli Danielsen at enda.



*- Tveir dystir eru eftir í landskappingini, og vit hava enn ein møguleika at røkka triðja plássinum, men í dag og í morgin hugsa vit bert um steypakappingina, sigur Atli Danielsen*

## B71 skal tryggja sær gullið

**Leygardagin spælir B71 seinasta dystin í 1. deild í ár. Liðið má hava minst javnleik ímóti LÍF fyri at tryggja sær gullið**

1. DEILD MENN

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

B71 hevur tryggjað sær uppflytingina til Formuladeildina, og tað hevur AB eisini gjørt. Men tað er framvegis ikki greitt, hvør vinnur 1. deild hjá monnum í ár, og gullið finnur ikki sín eigara fyrr enn á seinasta leikdegnum leygardagin.

Tvey stig eru á muni millum B71 og AB, og um B71 snávar í Leirvík leygardagin, kann AB strúka fram við og vinna gullið fyri nøsini á sandoyingum.

LÍF hevur mist sín kjans at flyta upp í bestu deildina næsta ár, og tí hava leirvíkingar einki trýst á sær til dystin leygardagin. B71 skal hinvegin royna at halda fast um sína oddastøðu, og málmunurin hjá B71 er so nógv betur enn hann hjá AB, at B71 kann klára seg við einum javnleiki ímóti LÍF.

AB má hinvegin vóna, at LÍF vinnu dystin, og samstundis skulu argjamenn syrgja fyri, at teir vinna sín dyst ímóti SÍ.

Sandoyingar ætla sær mannsterkir til Leirvíkar, nú uppflytingin til bestu deildina skal endaliga staðfestast, og gullið helst skal fáast heim við aftur. Skipað verður fyri bussferð í sambandi við dystin ímóti LÍF, og roknað verður við, at fitt av fólki verður við í ferðalagnum til Leirvíkar.